Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 300 miðvingar á legu

Seinasta vikuskifti vóru oman fyri 300 miðvingar í øllum aldri á bygdalegu í Nesvík.

Frammanundan var gjørt eitt stórt arbeiði við at fyrireika leguna. Og tað var ikki frítt, at her var nógv ymiskt á skránni, bæði til gaman og álvara.

Byrjað varð fríggjakvøldið við hugnaløtu, har m.a. ein dokumentarfilmur úr Miðvági varð vístur. Á skránni var eisini sangur við Sámali Ravnsfjall og Eivind á Presttrøðni, og seinni um kvøldið skipaðu tey ungu fyri lovsongsløtu við sangi, drama og vitnisburðum.

Leygarmorgunin vitjaði familjan Brend á leguni og greiddi frá missiónsarbeiði í afrikanska landinum Mali, og síðani var farið undir Miðvágsmeistarakappingina í sjavsi, borðfótbólti og innandura rógving.

Seinnapartin leygardagin kundu tey tilkomnu lurta eftir hugleiðingum hjá Jógvani Fríðriksson, meðan børnini vóru til hugnaløtu saman við Kristian Martini Petersen.

Seinni var hundaframsýning á skránni, har Absalon Hansen vitjaði. Í samband við hetta var eisini ein brotssparkskapping, har hundurin stóð í málinum.

Um kvøldið var kvøldseta við Jón Thomasen, har tónleikur, spurnarkapping, burturluting, dokumentarfilmur og frásøgn frá ferð í Ukraine vóru á skránni.

Eftir hetta var ungdómsløta á skránni við livandi gospeltónleiki og øðrum, eins og pizza og annað spennandi var á skránni.

Sunnudagin var gudstænasta hildin í leguhúsinum, har sóknarpresturin í Vágum, Davidf Johannesen prædikaði. Seinasta punkt á skránni var enn ein Miðvágsfilmur, har Dia Poulsen greiddi frá.

Seinni um dagin var pakkað saman og hvør fór aftur vestur til Miðvágs.



*Hóast nógv var á skránni so var eisini góð tíð til eitt hugnaligt prát*



*Í kjallaranum stóðu tríggjar rógvimaskinur. Her skuldi Miðvágsmeistarin í rógving finnast*



*Børnini høvdu sjáldan stundir at keða seg*




*Á leguni var eisini Miðvágsmeistarakappingin í talvi*